# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroyar og veðurlagsstevnan í Keypmannahavn

Nú nærkast kanska største tiltakinum nakrantíð í danska høvuðsstaðnum, altjóða veðurlagsráðstevnuni. Vit kunnu bara vóna, at ráðstevnan fer at gerast eitt veruligt vegamót í stríðnum móti dálking og fyri eini reinari og betri verð hjá núverandi og komandi ættarliðum at liva í.

Væl vitandi at tað eru ymsar áskoðanir um $CO_2$ dálkingina, hvaðani hon stavar, hvussu álvarslig hon er og hvussu vit best steðga henni ella minka um hana, so er avgerðin tikin um ráðstevnuna í Keypmannahavn. Hon er so eisini eitt náttúrligt og neyðugt framhald av undanfarnum ráðstevnum í Rio og Kyoto.

Eisini Føroyar eiga at geva henni ans, og tað er greitt, at vit eru eisini partur av henni so ella so. Hetta snýr seg eisini um okkara hugburð til eitt reint og burðardygt umhvørvi sum heild. Okkara geografiska støða mitt í Atlantshavinum við livandi og jarðbundnum tilfeingi av ymsum slag ger eisini okkum áhugaverd.

Okkara politikarar og fakfólk á ymsu økjunum eiga at geva sær fær um, hvat fer fram í Keypmannahavn og í tann mun vit kunnu tað geva okkara íkast. Eitt nú hava eisini vit granskarar, sum hava gjørt týðandi kanningar t.d. av havstreyminum, sum kann vera partur av eini størri heild. Nógva prátið um veðurlagið, sum hevur verið undan ráðstevnuni í Danmark, hevur eisini sett gongd í her heima, har eitt nú SEV er farið á barrikadurnar fyri at vísa eitt meira umhvørvisvinarligt andlit. Har roynt verður at troyta varandi orkukeldur heldur enn bara tær, sum eru bundnar at oljuni. Her kemur so eisini spurningurin inn í myndina um ans okkara fyri náttúruni. Og tað er ein dialogur, sum vit alla tíðina mugu hava síðuleypandi við útbyggingar av orkuni.

Øll heimspressan verður í Keypmannahavn í desember. Grønland hevur gjørt av at brúka hetta høvið til at kunna um landið sum ferðamanna- og íløguland. Øll Bryggjan verður grønlendsk hesa tíðina. At serligt fokus er á Grønland er eisini náttúrligt, tí landið er eitt tað mest ásýniliga og ítøkiliga dømi um, hvussu veðurlagið broytist frá degi til dags.

Hvat gera vit fyri at troyta henda einastandandi PR møguleika! Beinleiðis spurningur til løgmann og varaløgmann. Hvat gera vit á Bryggjuni! Norrøna fer at liggja í býnum, hevur verið hugsað um at gera hana út til vísa Føroyar fram sum ferðamannaland?

Vónandi eru føroyskir politikarar og vinnulívið so mikið at sær komin, at tey ikki lata hetta frálíka høvið at vísa fram Føroyar fara framvið.

**Sosialurin**

## Rætturin at atkvøða

JÓGVAN OLSEN

Debesartrøð, Havn

Fleiri spurningar áttu at verið avgjørdir við fólkaatkvøðu. Ein av teimum uppløgdu – fyri tíðina – er spurningurin um talið av valdømum. Tann spurningurin kann setast sum ein ja/nei-spurningur, sjálvt um hann helst eisini kann nuancerast meira.

Aðrir spurningar eru als ikki eru so ítøkiligir, men áttu kortini onkursvegna at verið settir okkum øllum at svara. Útjaðaramenning, til dømis. Hava tey, sum hava latið seg velja á ting, teir førleikar, sum hóska til eitt modernað fólkaræði, so duga tey eisini at skipa so fyri, at tað kann fáast fram, hvat fólk veruliga ynskja. Uppgávan hjá einum modernaðum politikara er ikki at spæla eitt spæl við veljaranum, fyri at fáa hann at halda, at tilvildarligu dispositiónirnar hjá Tinginum eru tað, sum veljarin veruliga ynskir.

Tað átti at borið til at sett nøkur ymisk modell upp fyri til dømis útbygging av samferðslukervinum, fyri síðan at lata fólk atkvøða um tað. Um teir ymisku valmøguleikarnir byggja á heilt ymisk prinsippir, so ber til at lata fólk atkvøða fyri tveimum ella fleiri valmøguleikum.

Nakað annað er, at vit hava upplivað eina stóra tøkniliga menning seinastu árini. Hetta átti at verið nýtt til at víðka um fólkaræðið. Nú, meðan øll eru samd um, at "arbeiðsskapandi tiltøk" eiga at vera sett í verk, kundu vit framleitt eina skipan til elektroniska atkvøðugreiðslu. Ein tílík kundi lættliga verið betur lagað til tann veruleikan, sum politikkurin skal viðgera, enn tann vanliga politiska mannagongdin. Og so høvdu vit eisini havt eina nýggja útflutningsvøru. Soleiðis høvdu vit kanska sloppið undan rossahandlunum í Tinginum: tú ein tunnil, eg ein almennan stovn.

Onnur týdningarmikil mál, tíverri eisini nuancerаði, eru bústaðarmynstur og samferðsla. Bústaðarmynstrið verður ofta umrøtt nakað líkasum veðrið: "okkara bústaðarmynstur er so og so háttað". Og eitt lágtrýst liggur vestanfyri. Men bústaðarmynstrið er nakað, okkara fólkavaldu hava skapt. Síðani verður bústaðarmynstrið brúkt sum argument fyri at varðveita og útbyggja ein infrastruktur, sum ger tað ógjørligt at skapa býir, sum eru góðir og hugaligir at búgva í. Býir, sum liva eitt lív.

Býarlív er ein av fortreytunum fyri at fáa hetta landið við inn í framtíðina. Spyrt tú borgaran, trúgvi eg, tey flestu ynskja sær ein góðan bý at búgva í. Ikki minst teir nógv umrøddu útisetarnir og hini fólkini, sum vit ynskja, skulu flyta til Føroya.

Rættir politikarar taka brókatøk við veruligu trupulleikarnar, heldur enn – eins og sjónvarpsgandakallar – at lokka fólk at stara at onkrum, sum er uttan relevans.

Men sjálvandi; vit hava teir tinglimir, vit sjálvi hava valt. Suff!

---

Vissuliga alt av Gudi er skapt, veri
tað í dárum mælt við
munni ella skrivað við penni.

Undrunarsamir yvir síni roysnisbrøgd eru,
men gloyma hitt fyrsta Orðið.

Ein byrjan má til,
og vit trúgvandi varin mugu vera,
ikki at treingja tykkum alt ov nær
at brennandi ásjón Guds.

*Christian F. Djurhuus*

---

At navn Sítt Elohim Gud opinberar,
ein vitnisburður er um Alveldi Hans og styrki.

Okkum menniskjum tað sagt
av munni kann verða, at heiti vit hava.

Men at ljós kalla myrkur, og myrkur kalla ljós,
tað navnabroyting er, og tað ei Gudi líkar,
men nøvnini á lutum Sínum rættir at vera.

*Christian F. Djurhuus*

---

Sjónligur heimurin vorðin,
mennist tilvitið til vaksandi trúgv,
uttan farra av iva í sátt og sømd.

Hvussu kundi eg tá avnokta
eitt so stórt skapanarverk?

Og hartil tess ásýnd á mær,
so ovursterk?

Dárar trúgva tí,
sum teir sjálvir hava skrivað,
men hvussu táið teir at mold eru vorðnir?

*Christian F. Djurhuus*

---

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.